planet.fo
Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Beyoncé til Danmarkar

Tann vakra poppprinsessan, fer nú til Danmarkar. Í samband við síni stóru Evropa rundferð, kemur Beyoncé Knowles til Danmarkar. Tann 10. mai fer hon nevniliga at vitja Messecenter Herning. Fyri minni enn einum mánaða síðan, gav hon út fløguna "I Am ... Sasha Fierce", ið er triðja fløga hennara. Hetta er eitt slag av koncept-fløgu, har hon hevur ein annan leiklut, sum ein heldur vill genta. Hendan leiklutin hevur hon eisini, tá ið hon fer at framføra á sínari rundferð, ið byrjar í Kroatia.
Messecenter Herning hevur enn ikki almannakunngjørt konsertina, men meira kunning fæst á heimasíðuna hjá teimum www.messecenter.dk, har tað stendur meira um bílegging av atgongumerkum o.ø.

*(skriva hevur Annika Lamhauge Mortensen, pratikantur hjá Sosialinum)*

Fólkaheilsuráðið:

## Nógv rúsevni á festivalunum

Rúsevnini eru nógv á festivalunum, og SSP-samskipanin vil fara uppí fyrireikingarnar til festivalarnar fyri at fyribyrgja hesum sum mest møguligt.

Sambært fundarfrágreiðing hjá Fólkaheilsuráðnum frá 12. november í 2008, eru festivalarnar karmar um nýtslu av rúsevnum. Sambært frágreiðingini eru ætlanirnar hjá SSP-samskipanini at gerast partur av fyrireikingunum av festivalunum, soleiðis at fólk verða meira tilvitaði um støðuna. Eisini er ætlanin hjá SSP-samskipanini, at fyrireikararnar av teimum ymsu festivalunum skulu í størri mun verða við til at fyribyrgja rúsevnis nýtsluna á festivalunum.

Hørðu rúsevnini populerast
Beinta Joensen, fyribyrgingarráðgevi, hevur nógvar royndir innan rúsevnismisnýtslu. Fyri tíð síðan hevði Sosialurin samrøðu við Beintu, og sambært henni var tað serliga tey sokallaðu hørðu rúsevnini, ið vóru at finna á festivalunum. Heroin og annað líknandi herjaði á festivalunum, meðan tey bleytu rúsevnini, sum til dømis hash, vóru eftir øllum at døma farin út av móta.

# Frændur 25 ár

**Í hesum døgum eru 25 ár liðin, síðan teir vælkendu Frændur menninir settu seg í studio fyri fyrstu ferð, og hetta skal sambært Steintór Rasmussen hátíðarhaldast.**

Vit kenna teir øll, og løg teirra hava runga kring Føroya land seinastu 25 árini. Teir hava fyri nógv verið ímyndin av frælsis stríðnum, umframt at sangir teirra eru at kalla sera tjóðskaparsinnaðir. Teirra løg hava merkt føroyskan sang í stóran mun, og fáa eru tey, ið ikki hava verið til eina veitslu, har Frændur løgini hava merkt sangin.

Fyrstu løgini í Frændur góvu út vóru millum annað tey vælkendu løgini "Hundurin Brúni" og "Lívsmynd", og hava hesi løg hava serstakan týdning fyri menninir í Frændum. Vit hava tosa við Steintór Rasmussen, og hann sigur soleiðis um løgini.

- Undrunarvert var tað, at Frændur vóru sera væl móttiknir frá byrjan tíð. Ólavsøkuna eftir okkara fyrstu útgávu, gingu fólk runt í býnum við ghettoblastarum, og úr teimum rungaðu okkara løg. Tað var ein ótrúliga løgin kensla, sigur Steintór.

Í 1986 komu síðani onnur sera væl kend løg á gøtuna, nevniliga "Eros" og "Føroyar", og aftur tá rungaði løgini hjá Frændum runt landið.

Fyri Steintór hava farnu 25 árini havt sera stóran týdning, og tíðin hevur, sum verða man, verið heldur serstøk.

- Tað hevur verið serstakt at uppliva í livandi líki, hvussu væl fólk hava tikið ímóti okkum. Vit hava havt nógvar stórar konsertir, og serliga minnist eg eina í Norðurlandahúsinum, har fólk stóðu á stólunum og sungu við. Eisini hevur tað verið sera lívsjáttandi, at okkara løg hava verið prentaði í nógvum sangbókum o.s.fr. , sigur Steintór

**25 ára hátíðarhald**

Spurningur ein situr eftir við, er hvussu fara Frændur menninir at hátíðarhalda 25 ára dagin? Spurdur um hetta sigur Steintór, at teir í komandi døgunum fara at hittast og práta um hvussu árið skal hátíðarhaldast. Sambært Steintór er møguleiki fyri, at Frændur fara at geva eina serliga útgávu út, umframt at teir spæla á Summarfestivalinum 2009.

- Um vit náa at geva eina fløgu út, so kunnu vit eisini geva fólkið eitt serligt upplivilsi á Summarfestivalinum, greiður Steintór frá.

Spennandi verður at síggja, um ætlanirnar hjá Steintóri verða til veruleika, og meira verður at frætta um hetta í komandi døgunum.

